## Næmingar seldu fisk



Studentaskúlanæmingar úr tveimum miðnámsflokkum úr Vági komu í morgun til Havnar at selja fisk í Gongugøtuni. Endamálið var at savna pening inn til eina námsferð til Barcelona í oktober. Hýsa, kalvi, saltfiskur og lambakjøt úr Sumba vóru í sølubúðini hjá næmingunum úr Suðuroy. Mariann Mikkjalsdóttir og Winnie Heinesen úr 2.S vóru inni á gólvinum í Miðlahúsinum fyrrapartin fyri at gera vart við, at góður fiskur var at fáa frá klokkan 10 í Gongugøtuni og allan dagin. Tær báðar gjørdu vart við, at søluátakið var góðkent av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Tað ganga á leið 30 næmingar í teimum báðum stundentaflokkunum í Vági.

# Teir skulu vænta sær ein brest

**- Eg góðtaki undir ongum umstøðum at brúka 400 milliónir til skúlar, uttan at fíggingin av Sandoyartunlinum er greið framman undan, sigur Gerhard Lognberg**

SKÚLADEPIL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Gerhard Lognberg hevur sum politiskt aðalmál at fáa fast samband til Sandoynna, og er eisini til reiðar at taka ein brst um tað skal vera*

Tingfólk lata væl at áralagnum í samgonguni, men uttanífrá kann tykjast, sum áralagið til tíðir meiri líkist einum rómapískara.

Partvís eru samgongulimir argir um, at fíggjarlógin ikki er komin fyri tingið enn, og í dag staðfesti Gerhard Lognberg, at semja langt frá er fingin um fíggingar og raðfestingar av íløgunum.

Í gjár bar Kristina Háfoss eitt uppskot niðan í tingið um Skúlamiðdepil í Marknagili, men sambært Gerhardi Lognberg skal hon og restin av samgonguni ikki rokna við hansara atkvøðu soleiðis uttan víðari.

- Eg góðtaki undir ongum umstøðum at brúka 400 milliónir upp á eina skúlaætlan, uttan at fíggingin av Sandoyartunlinum er greið framman undan. Nú skal eingin misskilja meg, eg havi einki ímóti skúlum; teir skulu vit hava, og teir skulu vera góðir. Men tað ber ikki til bara at tveita eitt uppskot niðan í tingið fyri 400 milliónir, eg havi eina lóg um Sandoyartunnil, sum skal byrja í 2009, at halda meg til, og áðrenn tann fíggingin er fingin upp á pláss, atkvøði eg ikki fyri skúladeplinum, sigur Gerhard Lognberg.

### Brestur

Hann slær sostatt fast, at áðrenn raðfestingin av íløgunum er fingin upp á pláss, og hann veit nakað ítøkiligt um fíggingina av Sandoyartunlinum, fær samgongan ikki hansara atkvøðu í málinum um Skúlamiðdepil í Marknagili.

- Vit hava eitt skip, sum er í ólagi í heilum, og hartil fer tað fast í dokk hvørja ferð summarið nærkast, so vit eru meiri ella minni uttan samband í einar tríggjar mánaðir, vísir Gerhard Lognberg á.

Sandoyartingmaðurin hevur alla tíðina verið sólaklárur í hesum málinum, og at hann ikki ætlar sær at vingla frameftir heldur, staðfesti hann fyri Sosialinum fyrrapartin í tinginum.

- Samgongan skal ikki rokna við, at eg trýsti á grøna knøttin, uttan at Sandoyartunnilin er fingin upp á pláss, sigur Gerhard Lognberg.

Hann heldur tað vera undarligt, at fólk eru á gosi um 600 milliónir til ein Sandoyartunnil, men at 400-500 milliónir til ein skúladepil ikki verða tiknar upp á tunguna. Men tað letur hann sær ikki lynda, og hann fer at standa fast við sítt.

- So tað kann saktast blíva ein brestur um hetta málið, men hann ætli eg mær at taka við stívum armi, sigur ein avgjørdur Gerhard Lognberg.



# Í bíðistøðu

**Landsstýrismálanevndin hevur í morgun havt fund, og sambært forkvinnuni, Heidi Petersen, er nevndin nú í bíðistøðu**

*Heidi Petersen og restin av Landsstýrismálanevndini er í einari bíðistøðu í løtuni*

KANNING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Vit hava havt fund í morgun, har vit viðgjørdu málið um Tórbjørn Jacobsen, fiskimálaráðharra. Vit hava heitt á løgmann um at upplýsa nevndina um, hvat hann nágreiniliga kannar, samstundis sum vit hava biðið hann halda nevndina kunnaða um málið leypandi, sigur Heidi Petersen.

Tá ein niðurstøða er greið frá løgmanni, fer nevndin at taka støðu til, um hon fer víðari við málinum.

- Okkara uppgáva er at kanna, um landskassin er verri fyri av partabrævasøluni, og um tað eru skattlig viðurskifti í málinum, sum hugt eigur at verða nærri at, sigur Heidi Petersen, forkvinna í Landsstýrismálanevndini.